# Sendiharrar í Klaksvík



*Ikki færri enn 25 sendiharrar við makum taldi ferðalagið, sum vitjaði í Klaksvík og á Viðareiði týsdagin*



*Jákup Ziskason og hansara harkalið borðreiddi við kaffi, te og pinnamati*



*Áhugin fyri plakatini, sum varð gjørd til Nordvesten mentanarstevnuna, var stórur, og John Færø greiddi frá*

**Stóra ferðalagið við ikki færri enn 25 sendiharrum við makum, sum er í Føroyum hesa vikuna, var í Klaksvík týsdagin**

SENDIHARRAVITJAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Í toku og sirmi kom tað stóra ferðalagið við Brimli á Klaksvík. Leiðin gekk har frá út á nýggja kryvjivirkið hjá p/f Kryvjing, har tey vórðu kunnað um smolt og alivinnuna í Føroyum.

Síðani fóru tey heim í Christianskirkjuna, har Alex Sólstein greiddi teimum frá.

Frá kirkjuni gekk leiðin til býráðshúsið, har Steinbjørn Jacobsen beyð teimum at vera hjartaliga vælkomnum til Klaksvíkar. Í sjálvari býráðshøllini sótu hesi fólk og fingu eina stutta vælkomu, har ferðaleiðarin hjá teimum, Trygvi Johansen, presenteraði nakrar stjórar í vinnu- og handilslívinum í Klaksvík.

Har vóru Jákup Sólstein, formaður í reiðarafelagnum, Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, Hanus Heinesen, stjóri í Føroya Banka í Klaksvíkog Heini Gregersen, stjóri í partafelagnum Kryvjing. So varð bjóðað til kaffi, te og pinnamat frá Jákup Ziskason. Og ímeðan gingu fólk aftur og fram og prátaðu og spurdu um ymiskt. Serliga vísti tað seg, at tey høvdu áhuga fyri serligu plakatini, sum varð gjørd í samband við Nordvesten mentanarstevnuna, sum var hildin í Klaksvík og Fuglafirði fyrr í summar. Tá tey vóru liðug at eta, sessaðust tey aftur.

Ólavur Waag Høgnesen og greiddi frá søguni um Klaksvík. Og hann greiddi eisini frá, hvussu Klaksvík er voksin seinastu úti við 100 árini. Millum annað kom hann eisini stutt inn á Klaksvíksstríðið.

Tá frágreiðingin hjá Ólavi var liðug, gekk leiðin norður til Viðareiðis, har vitjað var heilt stutt í Viðareiðis kirkju. Enn einaferð var tað Alex Sólstein, sum greiddi frá. Síðani gekk leiðin niðan á hotel Norð, har Klaksvíkar Býráð bjóðaði døgurða.

Vitjanin hjá sendiharrunum endaði seinnapartin um trítíðina, tá Brimil fór avstað aftur við øllum ferðalagnum.



*Alex Sólstein var sera tíðindafróur. Hann greiddi frá, tá ferðalagið vitjaði Christianskirkjuna og Viðareiðis kirkju*

Tøknileiðarin í SvF:

## Farin úr starvinum

**Mikudagin hevði Sosialurin eina óváttaða søgu um, at tøknileiðarin í Sjónvarpi Føroya var farin úr starvinum. Nú hevur stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, váttað, at Dávur Isfeldt ikki longur er tøknileiðari á stovninum**

STARV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Tøknileiðarin á Sjónvarpi Føroya hevur tikið avleiðingarnar av ábyrgdini av sínum starvi og hevur biðið um at verða loystur úr sínum verandi starvi, sum tøknileiðari, sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya.

Hann vil ikki inn á nakrar smálutir hesum viðvíkjandi, men sigur tó, at Dávur Isfeldt fær tillutaðar aðrar uppgávur á stovninum í framtíðini.

Sostatt kann staðfestast, at fyrrverandi tøknileiðarin í Sjónvarpi Føroya, Dávur Isfeldt, hevur tikið avleiðingarnar fyri, at føroyingar ikki sluppu at síggja meira enn helmingin av dystinum millum Skotland og Føroyar leygardagin og sagt seg úr starvinum.



# Bíblian á pallinum



*Lone Hertz hevur fingið framúr góð ummæli av sínari framførslu av Opinberingini, sum hon framførir í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið.*
*Mynd: ARTE BOOKING*

**Fríggjakvøldið framførir Lone Hertz *Jóhannesar Opinbering* á palli í Mentanarhúsinum. Talan er um eina villa og blóðuga søgu, sum er ein ávaring hjá einum og hvørjum heimsborgara í dag. Prestur kallar leikin fyri bestu listarligu endurgeving av Bíbliuni**

SJÓNLEIKUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Opinberingin er tann teksturin í Nýggja testamenti, sum einamest hevur verið kjakast um.

Fríggjakvøldið 12. september klokkan 19.30 fáa føroyingar høvi at uppliva Opinberingina sum einmansleik í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Við einum slagi av dogme-sjónleiki verður hendan villa og blóðuga søgan søgd sum ein ávaring ímóti óndskapi, har vónin og gleðin standa sum mótvekt.

Talan er um ein einmansleik, sum Lone Hertz stendur fyri. Føroyingar fáa sostatt høvi at uppliva leiklist á allar hægsta stigi, nú hon vitjar. So nógv hava eisini longu keypt sær atgongumerki, at Mentanarhúsið hevur tikið stóra salin í nýtslu, so fleiri sleppa inn. Pláss verður fyri 450 fólkum.

### Góð ummæli

Leikurin hevur fingið framúr góð ummæli í Danmark. Politiken skrivaði millum annað um avrikið, at máttmikla listin hjá Lone Hertz aftur hevur fingið ein gloymdan og dustfongdan tekst at liva sum einastandandi heimsbókmentir. »Imponerende monolog, scenisk og artikulatorisk stadig varieret«, skrivaði Politiken.

Og Jyllands-posten var í somu vendingum: »Forjættelsens teater! Stemmen er sagte hviskende fuld av mildhed, ansigtet af smilende længsel og forventningsfuld sødme. En helt lille forjættelse i sig selv.«

Eisini danskir prestar hava givið leikinum sítt viðmæli. Teirra millum er Thorkild Græsholt, biskuppur, sum kallar leikin fyri ta bestu listarligu endurgevingina av Bíbliuni, sum hann hevur hoyrt gjøgnum mong ár.

– Ávegis inn í eitt nýtt ártúsund og við støðuni í heiminum í dag í huga er viðkomandi at fáast við Opinberingina, sum bæði er ein áminning og ein troyst, sigur Thorkild Græsholt.

### Ringanna harri

Leikurin ýður í óhugnaligum dýrum, náttúruvanlukkum, deyða og undirgangi. Eins og filmar hjá Spielberg. »Ringanna harri« hevur somuleiðis fingið íblástur úr Opinberingini.

Í uppsetingini hjá leikstjóranum Henrik Sartou er tað ein kvinna, sum fær opinberingina hjá Jóhannes. Hon líkist einari ungari kvinnu, men kundi eins væl verið 100 ella 2000 ár. Hon hevur fingið eina opinbering, sum hon er fylt við. Hon ynskir ein nýggjan himmal og eina nýggja verð.

– Moralurin er heilt einfalt, at heimurin er ikki størri, og tú ert ikki minni í heiminum, enn at tú hevur eina ábyrgd fyri, hvussu heimurin hevur tað, sigur Henrik Sartou, leikstjóri.

Hóast leikurin er dapur, so er tað ljósið, hann vil vísa. Um tú vilt siga frá ljósinum, so skal tað helst gerast í myrkri. Tí annars er eingin mótsøgn á pallinum.

### Vaksin barnastjørna

Burtursæð frá einum stórskíggja er Lone Hertz einsamøll á palli, og tað er krevjandi í einum slíkum leiki. Men hon hevur eisini roynt at sindur av hvørjum, síðan hon varð sonevnt ballettbarn í Kongliga Leikhúsinum.

Barnastjørna gjørdist hon í filminum »Hold fingrene fra mor« og »Vores fjerde far«. Seinni gjørdist hon kend í sjónvarpi, og á sínum 25 ára degi fekk hon virðisløn Claru Pontoppidans sum evnaríkasti danski sjónleikarin. Sermerktur var filmurin, hon gjørdi um sín menningartarnaða son Thomas.

Árini 1984 til 1990 var Lone Hertz rektari á Statens Teaterskole. Hon er fødd í 1939 og er útbúgvin á Privatteatrets skole. Í Sosialinum í morgin verður ein longri samrøða við Lone Hertz.

# Ferðin til táranna land

**Í einum rørandi, hugvekjandi og ótolandi fyrilestri fer Lone Hertz at tosa um fólk í sorg, pínu og vón. Hon greiðir frá sínari seinasta ferð fyri Danmission, sum var til Kambodja – táranna land**

FYRILESTUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Lone Hertz er ein fjølbroytt kvinna. Umframt einmansleikin Opinberingina, sum hon framførir í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið, og fyrilesturin í Norðurlandahúsinum leygrdagin um menningartarnað, fer hon at halda ein fyrilestur í Missisónhúsinum á Toftum sunnudagin 14. september kl. 18.00.

Fyrilesturin snýr seg um eina ferð, sum Lone Hertz hevur gjørt til Kambodja fyri Danmission. Í Kambodja tosaði hon við yvirlivandi frá ræðslustýrinum hjá Pól Pot. Og hon upplivdi pínuna hjá teimum útstoyttu aids-sjúklingunum, sum lógu til at doyggja í fátækrabýlinginum í høvuðstaðnum. Men hon møtti eisini fólkum, sum bóru vónina og høvdu eina kærleiksmissjón.

Upplivingarnar í Kambodja eru grundarlagið í fyrilestrinum, har hon fortelur um eydnuna við at hava eina lívsuppgávu, eina missjón, sum skapar og gevur meining. Hon viðger tað skirvisliga menniskja og tess val, og hvussu lætt ein missjón fer av sporinum. Hon umrøður eisini, hvør megi tað er, sum leiðir menniskjað. Myrkursins ella ljósins kreftir. Og hun umhugsar eisini, hvat ein missjón í Jesu navni er í dag.

– Kambodja er eitt sorgarinnar land. Her sást týðiliga, hvat kristni boðskapurin við kærleika og fyrigeving merkir. Eg møtti menniskjum, sum livdu teirra kristindóm við at tæna øðrum. Á tann hát fortaldu tey við teirra lívi, hvat vegurin, sannleikin og lívið er, sigur Lone Hertz, hvørs fyrilestur tekur hálvan annan tíma við kjaki aftaná.